DAGSINS MEINING

Svínabundin

Føroyskir skattaborgarar, sum hava goldi› umlei› 100 mill. kr. til n‡ggja vaktarskipi› Brimil, mugu lata sær lyndi í óvissa tí› framyvir bara at síggja sítt spildurn‡ggja vaktarskip í blø›unum ella á sjónvarpsskíggjanum. Brimil liggur nevniliga svínabundin í Noregi og sær ta› út til, at hann kemur at liggja har í langa tí›.

Orsøkina kenna vit øll: fakfeløgini hjá manningini nokta fólki sínum at sigla skipi› heim soleingi landsst‡ri› ikki vil samrá›ast um ein lønarsáttmála fyri manningina á n‡ggja vaktarskipinum. Landsst‡ri› hinvegin fer upp á bakbeinini og sigur kortanei til at samrá›ast, soleingi talan er um eina hóttan ella enn verri, soleingi manningin ikki vil fara til arbei›is og sigla skipi› til Føroya.

Man veit ikki, um man skal flenna ella gráta. Tí hetta er jú ein parodi - fyrst at brúka áralangt strí› og tjak til í heila tiki› at bestemma seg til eitt skip - fyri sí›ani at brúka nógvar pengar til at byggja eitt n‡tt skipVit skulu ikki taka dagar ímillum, hvør hevur rætt og ikki, men vit kunnu tó sta›festa, at hetta er ein fyri Føroyar fullkomiliga láturlig og ótolandi stø›a, nú vit loksins fingu okkara vaktarskip.

Uppgávurnar standa og bí›a og kunnu vit vera skipi› fyriuttan í langa tí› aftrat, so má man seta spurningin: um ta› í heila tiki› er brúk fyri nøkrum skipi. Landsins myndugleikar mugu gera upp vi› seg sjálvar, um teir meta Føroyar hava brúk fyri Brimli her og nú ella um hann skal liggja og rusta vi› norska bryggju í mána›ir og kanska ár.

Tá ver›ur ta› ein leskiligur biti hjá andstø›uni á tingi at fáa Brimil á valbor›i› um gott og væl eitt ár.

Landsst‡ri› ella rættari fíggjarmálará›harrin sleppur ikki undan tí sannroynd, at ta› finst ikki ein hóskandi sáttmáli fyri manningina á n‡ggja vaktarskipinum. Hetta er ta› sum fakfeløgini vísa á, og sjálvandi vilja tey tryggja sínum limum eina rímuliga og sømuliga løn. Tí skilir man væl feløgini. Men kanska áttu tey tó at víst so miki› av samfelagssinni, at tey góvu undantaksloyvi til manningina at sigla skipi› til Føroya, solei›is at hetta bleiv eitt mál, sum kundi loysast her heima. Ta› hev›i uttan iva eisini veri› lættari hjá fakfeløgunum at tosa fyri síni søk, um fólk sá skipi› liggja vi› bryggju her heima, sum eitt anna› spøkilsisskip. Nú skipi› liggur í Noregi hevur eingin naka› "forhold" til ta›. Ta› er sum so ikki okkara fyrr enn ta› er heima. Hetta veit knallhar›i Karsten og tí brúkar hann eisini hetta trumfkorti› kalt og kyniskt. Hinvegin átti landsst‡ri› at tryggja› manningini á n‡ggja vaktarskipinum avtalu sum ta› sømir seg.

Ta› skal tí vera okkara áheitan á fakfeløgini: gevi› monnum undantaksloyvi at sigla heim og seti› tykkum so vi› bor›i› saman vi› landsst‡rinum og grei›i› máli›. Ta› er tykkara uppgáva og ábyrgd. Skattaborgarin og harvi› Føroya land er gísli í málinum og gíslatakarar eru bæ›i fakfeløg og landsst‡ri›. Taki› tykkum saman.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

60 ár

Bjarni Bæk, dómpróstur, er føddur 25. oktober 1940 í Danmark og fylti sostatt fyrradagin 60 ár. Hann er sonur Johannes Bæk, i› millum manna var kendur sum missioner Bæk.

Bjarni Bæk tók studentsprógv í Havn í 1959 og tók í 1968 gu›frø›iligt embætisprógv vi› Lærda Háskúlan í Keypmannahavn. Sama ár gjørdist hann hjálparprestur vi› Hvidovre Kirkju.

Í 1972 var› hann settur í starv sum sóknarprestur í Lindhøj í Herlev. Sjey ár seinni kom hann til Føroya í starvi› sum sóknarprestur í Su›uroyar Sunnara Prestagjaldi. Í 1989 var› Bjarni Bæk settur í starv sum sóknarprestur í Su›urstreymoyar Eystara Prestagjaldi.

Sí›ani 1995 hevur hann veri› dómpróvstur vi› Føroya Stiftsstjórn.

Sí›ani 1990 hevur Bjarni Bæk veri› orlogsprestur hjá Færøernes Kommando og Flyvestation.

Andlát

Seinasta hósdag anda›ist Linvold Heinesen úr Sandavági 97 ára gamal. Seinastu árini hevur hann hildi› til á Ellis og Røktarheiminum í Vágum. Hann hevur trivist sera væl á Ellisheiminum og heilsan hevur veri› gó› heilt til ta› seinasta.

Linvol var giftur vi› Annu Sofíu Eldevi› ætta› úr Elduvík og tey fingu 11 børn. F‡ra av teimum eru eftir á lívi. Lagnan var hør› vi› Linvold, fleiri av børnunum doy›u heilt ung, men hann bar lagnuna sum ein ma›ur.

Linvold var sjóma›ur øll síni manndómsár og hann sigldi øll kríggsárini. Linvold var ein partur av bygdarmyndini í Sandavági og mangan var hann at síggja ni›ri á Trænum og luttók í prátinum vi› bygdarmenninar um vi›urskiftini í Sandavági og kring allar heim annars.

Activ 30 ár

Mikudagin vór›u li›in 30 ár sí›ani, at Martha Hansen í Havn lat upp kioskina Activ í Jónas Broncksgøtu í Havn.

Men kioskin - ella handilin, sum vit heldur mugu siga, er ikki tann sami í dag, sum hann var tá. Hann er broyttur einar tríggjarf‡ra fer›ir sí›ani, men nú ber ikki til at vaksa meira um handilin, tí hann fyllir so at siga allan kjallaran, sigur Martha.

Men ein kiosk í Havn í dag er ikki ta› sama, sum í 1970. Tá stó› kundin vi› skivuna og mátti peika á ta vøruna, hann vildi hava. Í dag er handilin meira at kalla eitt mini-supermarket, sum tey siga a›rasta›ni.

Í dag selja øll alt - og kappingarneytar hjá kioskunum av hesum slag eru bensinsølurnar, sum í dag selja meiri kolonialvørur enn bilvørur. Og so er: Skalt tú hava bonivox ella hjólskálir til bilin, er úrvali› størri í Keypsamtøkuni, men skalt tú hava brey› ella kaffi, fært tú ta› eins væl á bensinstø›unum…

Onnur stór broyting hesi árini er, at nú hava kioskirnar nógv longri opi›. Kortini hava tey afturlati› størstu halgidagarnar, men annars er opi› frá tí›liga á morgni - eisini sunnumorgun, so um vit hava gloymt okkurt til sunnudagsdøgur›an, so er ta› eingin katastrofa.

Martha Hansen ver›ur 64 næsta mána›, og hon er tí farin at fyrireika seg til at leggja frá sær. Dótturin, Peturbjørg, er nú dagligur lei›ari í handlinum, men Martha fær illa hildi› seg burtur.

Í sambandi vi› fø›ingardagin hevur Kiosk Activ ymisk tilbo›, eitt nú ísar fyri tríggjar krónur og ymiskt anna› gott sum karamellur, sandwish og heitar pylsur, sum annars er n‡ggj vøra hjá teimum.

12 fólk starvast í dag í Kiosk Activ

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Hjørdis Árnadóttir hjordis@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
bokhald@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lystorg@sosialurin.fo
innsent@sosialurin.fo
tiltok@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Tróndur Djurhuus á Føroya Tele

Tróndur Djurhuus, fyrrverndi sjónvarpsstjóri, er settur í n‡tt starv hjá Føroya Tele. Hann skal vera vi› til at menna virkisætlanir á stovninum

Tróndur Djurhuus fyrrverandi stjóri í Sjónvarpi Føroya, er settur í n‡tt starv hjá Føroya Tele.

Tróndur Djurhuus skal hava eina stabsfunktión sum á Føroya Tele ver›ur nevnd »Strategi og forrætningsútvikling«. Ta› vil siga menning av n‡ggjum skipanum og tænastum, sum Føroya Tele fer at lata kundum sínum.

Telefyritøkur úti í heimi fara alt meira inn í ymsar n‡ggjar tænastur. Bæ›i tí›indaflutning, undirhald og ymsar a›rar tænastur.

Eitt ta› n‡ggjasta er tann sonevnda WAP tænastan, har ein kann n‡ta fartelefonina sum eina a›ra teldu. Stutt og greitt ber til at flyta Interneti› yvir á fartelefonina og ha›ani avgrei›a allar tær uppgávur, ein hevur. Ta› veri seg bankaflytingar, tí›indaflutning ella hvat ta› nú skal vera.

Føroya Tele fer eisini at fylgja vi› hesi menningini og vil fegi› lata kundum sínum allar tær tænastur, sum onnur feløg kunnu lata.

Føroya Tele hevur tí›indatænastuna Olivant, sum ætlanin er at menna enn meira. Og her er upplagt, at Tróndur Djurhuus eisini er vi› í teirri menningini.

Sum er, er tí›indatænastan hjá Olivant at rokna sum einhvør onnur vanlig tí›indatænasta. Men ætlanir eru úti í framtí›ini til dømis at lata kundar gerast haldarar av ávísum tí›indum og tænastum, sum júst passa til tørvin hjá tí einstaka.

Samstarv hevur veri› millum Olivant og Sosialin á hesum øki. Men bla›ma›urin frá Sosialinum, sum hevur røkt hesa tænastuna, fer nú í starv sum tí›indama›ur hjá Føroya Tele burturav.

Fjølmi›lama›urinTróndur Djurhuus fer úr tí opna fjølmi›lastovninum Sjónvarpinum, í tann meira afturlatna stovnin Føroya Tele

Arbei›sgevarin skal gjalda

Máli› um tríggjar frisørar, sum fingu lærlingaløn, sjálvt um eingin sáttmáli var› undirskriva›ur, er nú avgreitt, og lærumeistarin er dømdur at gjalda teimum vanliga løn tó uttan rentur

FRISØRLÆRLINGAR
Stefan í Skorini

Eystari Landsrættur vi›gjørdi máli› um frisørlærlingarnar 3. oktober, og ni›urstø›an var nærum tann sama sum Føroya Rættur kom fram til. Eitt sindur var› tó skarva› av lønini hjá einum av frisørunum.

Máli› snú›i seg um, at tríggir ungir frisørar arbeiddu fyri lærlingaløn uttan at sáttmáli var› gjørdur. Frisørarnir kravdu tí at fáa løn samsvarandi sáttmálan vi› arbei›sfeløgini í tí›ini, tær høvdu arbeitt uttan lærlingasáttmála.

Semja var› gjørd millum partarnar, sum seg›i, at um høvu›skrøvini saman vi› sakarkostna›i vór›u goldin í seinasta lagi fríggjadagin 6. oktober, so vór›u renturnar sleptar. Hildi› var›, at um renturnar vór›u sleptar, gav hetta betri hug at gjalda. Saksøkjarin var eisini bangin fyri, at tann saksøkti fór ví›ari vi› málinum.

Arbei›sgevarin hevur játta› at ganga undir hesar treytir, og frisørlærlingarnir hava nú fingi› peningin.

Talan er um gó›ar 80.000 krónur, sum arbei›sgevarin av røttum skuldi gjalda trimum frisørum. Henda lønin er nú goldin av arbei›sgevaranum.

Ni›urstø›an í hesum málinum er, at arbei›sgevari, sum tekur ung fólk í arbei›i uttan at skriva lærusáttmála, skal rinda eina hægri løn enn lærlingaløn. Hetta er sta›fest í hesum málinum.

Ikki í Íslandi, men í Havn

Stefan í Skorini

Á baksí›uni í gjár var› skriva›, at lærararnir á Eysturskúlanum eru á skei›i í Íslandi. Hetta er ikki rætt, tí lærararnir sita á skei›i í Havnini. Skúlastjórin á Eysturskúlanum var so beinasom at vísa á hetta mistaki›, og vit takka fyri.